Framhald av síðu 15

magar, til úrdrattir, sum verða brúktar til íblanding í smyrsl, heilivág, orku og kosttilskot, functonal foods v.m., at vaksa úr 30 mio. Kr í 2001 til 1,1 milliard í 2012.

Tann minsti virðisvøkstur, vænta íslendingar, er innan tær siðbundnu framleiðslunar.

Tað átti ikki at verið nakað í vegin, fyri at eisini føroyingar kundu troytt teir virðisskapanarmøguleikar sum liggja innan hjáframleiðslur og biotøkniskar úrdráttir. Gongdin í heiminum er eisini soleiðis, at rávørumarknaðurin verður alsamt meira globaliseraður t.m. at tað verður altjóða frí kapping um ráfiskin. Tey londini sum duga best at fáa burturúr øllum, vilja verða vinnarnir í hesi kappingini.

Afturat teimum trimum møguleikunum, sum eru nevndir omanfyri, er spurningurin um burðardygga veiðu og gagnnýtslu av øllum. Á enskum verður hetta rópt **Responsible Fisheries** og **Responsible Utilisation.**

Hetta er eitt rák í heiminum, sum alsamt fær størri týdning í samband við framleiðslu og sølu, av matvørum, sum heild.

Tann føroyska fiskidagaskipanin, er uttan iva ein skipan, sum stilla føroyingar sterkar, í samband við burðardygga veiðu. Í spurninginum um burðardygga framleiðslu, eru vit tíverri langt frá tí, sum kemur undir hetta hugtakið. Hetta gerst sjálvandi ikki eftir, stuttari tíð, men vit mugu seta hol á nú. Tann fyrsta fortreytin fyri hesum er, at innvøllirnar ikki verða tveittir fyri borð, men verða tiknir til lands og gagnnýttir til lønandi virksemi.

Tann almenni myndugleikin kundi rætt vinnuni eina hjálpandi hond, við at fáa inn í lógina um vinnuligan fiskiskap, eina skyldu, at taka teir innvøllir til lands sum tað finnast fiskakeyparar til. Teir sum velja ikki at taka innvøllinir til lands, kundu t.d. verið sektaðir við mistum fiskidøgum. So er tað upp til tað einstaka reiðaríið at avgera um tað er meira lønandi at tveita innvøllinur í havið ella taka teir til lands.

Vinnan, má tillaga sítt framleiðsluval, val av marknaði og kostnaðarstøðinum, eftir teimum broytingum, sum henda í kappingarumhvørvinum

Leikluturin hjá almennu myndugleikunum, verður at skapa góðar karmar fyri at røkka teimum málum sum eru nevnd omanfyri. Hetta hevur við sær at betrast má um flutningsmøguleikarnar, gransking og útbúgving má stuðlast, og sett verða almenn krøv í samband við góðskuni á rávøruni, og at medvirkað verður til at einki verður tveitt fyri borð, sum virði kann fáast burturúr. Føroyskum fiskavirkjunum, mugu eisini javnsetast við útlendsk fiskavirkir, í kappingini um ráfiskin.

Vinnugransking og nýskapan, fer framyvir at hava ein sera stóran týdning, taið umræður at menna nýggjar vinnur og vørur. Tað er tí hugstoytt at játtanin til eitt nú Fiskivinnuroyndir verður niðurskorin á komandi fíggjarlóg.

Framtaksgrunnurin, sum vinnumálaráðið varðar av, má fáast at stuðla nýggjum vinnum og verkaætlanum, og ikki sum higartil, mest at virkað eftir undantaksregluni.

TALVA V: Samanbering av útflutninginum av óvirkaðum fiski úr Føroyum og Íslandi í árinum 2002.

SAMANB. ÚTFLUTNING ÓVIRKAÐUR FISKUR FØ OG ÍS 2002

2002	FR. VEIÐA	FR.ÓV.	%	IS.VEIÐA	ÍS.ÓV.	%	MUN %
Toskur	38116	11816	31%	240000	5300	2%	29%
Hýsa	23713	13279	56%	40000	3792	9%	47%
Upsi	50232	12056	24%	32000	322	1%	23%
Annað	25121	12309	49%	100000	11850	12%	37%
ÍALT	**137182**	**49460**	**36%**	**412000**	**21264**	**5%**	**31%**

TALVA VI: Hjáframleiðsla Ísland 2001 (Arason 2002)

LIVUR ÚRDRÁTTIR	NØGD (t)	VIRÐI (mio.)	KR/KG
Medisinlýsi	1573	kr 32.361	kr 20,57
Rálýsi	2146	kr 18.530	kr 8,63
Niðursjóðað livur	220	kr 8.428	kr 38,31
Fesk og fryst livur	238	kr 2.105	kr 8,84
Onnur livur	168	kr 1.132	kr 6,74
TILSAMANS	**4345**	**kr 62.556**	**kr 14,40**

AÐRIR ÚRDRÁTTIR:	NØGD (t)	VIRÐI (mio.)	KR/KG
Turkaði høvd	11432	kr 187.500	kr 16,40
Saltaðar høvdaúrdráttir	4277	kr 69.509	kr 16,25
Rogn	2797	kr 175.556	kr 62,77
Ryggir, skræða, avskurður	4605	kr 52.592	kr 11,42
Biotøkniskir úrdráttir	50	kr 30.000	kr 600
TILSAMANS	**23161**	**kr 515.157**	**kr 22,24**
HEILDARTOTALIR	**27506**	**kr 577.713**	**kr 21,00**

TALVA VII:

AVS PROJECT ICELAND (Arason 2002)
POT. VIRDIS VØKSTUR FISKIVINNA ÍSLAND 2001-2012

ØKI/ÁR	2001	2007	2012	MUNUR 2001-12	MUNUR í %
Útgerð og vitan	600	800	1200	600	100%
Hjáframleiðslur	**600**	**1200**	**2400**	**1800**	**300%**
Biotøkniskir úrdr.	**30**	**180**	**1100**	**1070**	**3567%**
Aling	**100**	**600**	**3600**	**3500**	**3500%**
Vanlig framleiðsla	4600	5800	7200	2600	57%
Rávøra	7100	7800	8600	1500	21%
TILSAMANS	**13030**	**16380**	**24100**	**11070**	**85%**

VIÐMERKINGAR

Kim Simonsen og Erasmus Montanus - misskiljing ella eitt Erasmus Montanus komplex ?

Regin Eikhólm
23/10-03

Í Sosialinum 14/10-2003 hevur Kim Simonsen sum so ofta áður eina áhugaverda grein. Hesaferð um leikin Erasmus Montanus hjá Ludvig Holberg (1684-1754). Í hesum sambandi endurgevur og viðmerkir Kim Simonsen brot úr Erasmus Montanus í føroyska kjakinum, har hann sigur, *at tey sum brúka Erasmus Montanus negativt hava misskilt, hvat Holberg vildi við persóninum Erasmus Montanus, meðan tey sum sýna samkenslu og leggja dent á, at Erasmus Montanus hevur rætt, eru gløggir lesarar.*

Sum kunnugt vildi Holberg lata fólkið síggja seg sjálvan í spegilsmynd í tí, sum fór fram á palli. Tá so studenturin og magistaraspírin, Erasmus Montanus, kemur heimaftur og oysir av sínum ástøðisliga universitetslærdómi um nýggjastu vitan innan de facto nátúruvísind, har jørðin ikki longur er fløt men rund, so er einki galið við tí. Hetta man so mangur heimafturkomin nýútklaktur føroyingur kenna seg aftur í. Men tá Holberg - við metafysiskum speisemi - letur tann væl disputerandi Erasmus Montanus royna seg í tí formella logikkinum hjá Aristoteles (384-322 á.Kr.) gongur galið.

Erasmus Montanus logikkur

1. Útsøgn (præmis): En sten kan ikke flyve.
2. Útsøgn (præmis):I (morlille) kan ikke flyve.
3. Niðurstøða (syllogisma) Ergo er morlille en sten.

Herav framgongur, at Erasmus Montanus ikki kendi til tær grundleggjandi logisku fortreytirnar, tí so hevði hann vita, at tað ber ikki til at gera niðurstøðu (syllogismu) út frá tveimum negativum útsøgnum (præmissum), tí niðurstøðan verður følsk. Holberg vísir við hesum á, at hóast Erasmus Montanus hevði ástøðiliga vitan og m.a. visti at jørðin var rund, so kendi hann ikki til tað mest basala í formella logikkinum. Hetta foraði honum kortini ikki retoriskt í at gera eina niðurstøðu, sum var skeiv og uttan hald í veruleikanum.

Tað var í hesum samanhangi at undirritaði samanbar logiska førleikan hjá Høgna Hoydal, varaløgmanni, við tann hjá Erasmus Montanus, tá varaløgmaður í Sjónvarpi Føroya visualiseraði danska skurkin í bankasakini við eftirgjørdum duldum myndum. Útsagnirnar hjá varaløgmanni hildu ikki, og tí gjørdist niðurstøðan eisini skeiv hjá honum.

Akademiska førleikan annars bæði hjá Erasmus Montanus og varaløgmanni, hevur undirritaði ongantíð sett spurnartekin við, men teirra logiska ræsonnement í oman fyri nevndu tilburðum geva samanfallandi skeiva ella falska niðurstøðu. Tað, sum Holberg eksplicit vil siga við hesum logiska passus, er, at ávísur akademiskur førleiki í sjálvum sær ikki er nakar garantur fyri at niðurstøða hjá viðkomandi altíð er logisk samanhangandi og sonn.

Kim Simonsen og Erasmus Mantanus

Rúgvismikla skrivingin hjá unga Kim Simonsen ber brá av tí meiri kvantitativa heldur enn tí kvalitativa, og summariska enten/eller niðurstøðan um Erasmus Montanus loyvir ikki differencieraðum nýansum framat. Hjá Kim Simonsen er Erasmus Montanus ein fittur og vitandi studentur, sum visti hvat hann tosaði um, men hansara heimliga umhvørvið og nakrir føroyingar - íroknað undirritaða - skilja ikki.Erasmus Montanus, tí teir brúka hann ikki positivt.

Holberg letur Erasmus Montanus umboða ein hugmyndafrøðiligan margtáttaðan og samansettan persón, sum í tíðarbundnum stíli og við atliti til galdandi dannelsesideal, bæði skal karrikera, provokera, upplýsa, vegleiða og tiláturssgera tað gamla stagneraða og tað nýggja sjálvuppgjørda. Hesin komplexitetur er sýnisgluggi og pallur fyri retorisku orrustuni, har ambitiónir, maktgirnd, sosial og moralsk indignatión, akademisk hugmóð og lívsins realitetir annars halda vekingarmøti í eini upplýsandi skiftistíð. Tað naiva enten/eller verður avloyst av tí rationella søkjandi.

Kim Simonsen setur seg til dómara yvir hvør rætta reflesiónin er uppá Erasmus Montanus fyribrigdið - hon skal vera positiv, sigur hann. Men her tykist hann ikki heilt at hava fatað tann kompleksa og margtáttaða persónin, sum Holberg hóast alt letur Erasmus Montanus umboðað. Helst byggir hetta á eina misskiljing ella á eitt Erasmus Montanus komplex?

Forelskaður sjónleikari í finaluni

Frammanfyri einari stórari áhoyrarafjøld vann Finnur Jensen 2. undanumfarið í singer/songwriter 2003

TÒNLEIKUR
Tíðindaskriv

Leygarkvøldið var annað umfar av singer/songwriter 2003 kappingini hjá Hotel Hafnia. Tá dómararnir høvdu sagt sítt, gjørdist tað greitt, at tað verður Finnur Jensen, sum fólk sleppa at hoyra aftur í finaluni 22. november.

Áhugin fyri fyrsta undanumfarinum, sum Ronni Poulsen vann, var stórur, men ikki kann sigast annað enn, at enn fleiri fólk leitaðu sær oman í Hafnia Lounge leygarkvøldið enn til fyrsta umfar.

Og tað var ein ógvuliga fegin Finnur Jensen, sum kundi sessast aftur við gittaranum og spæla nøkur fleiri løg fyri áhoyrarunum.

– Hetta var ótrúliga stuttligt. Tað kendist gott at spæla her í kvøld. Stemningurin var framúr góður, og tú merkti veruliga at fólk vóru glað fyri at vera her, segði Finnur Jensen.

Finnur Jensen og hinir í Páll Finnur Páll liggja í løtuni fyri fjórðu viku á rað á ovastu rók. Hin oddamaðurin í Páll Finnur Páll, Páll Oddur Rubeksen, royndi seg eisini sum solist í kappingini leygarkvøldið.

Blandað

Hvat viðvíkir stíli, so var annað undanumfar ógvuliga blandað. Fyrstur við mikrofonina var Pól Hentze. Skopuningurin Pól spældi trý andalig løg hjá sær sjálvum. Hann smæddist ikki burtur og gav tað, hann átti.

Stílurin broyttist fullkomiliga, tá Tønnes Mikkelsen settist at spæla fyri fólkið. Hann legði stóran dent á at fáa fólk við og undirhelt rættiliga við sínum trimum fólkaligu løgum.

Páll Oddur Rubeksen eigur ein heilt serstakan stíl. Tað prógvaði hann aftur leygarkvøldið, tá hann sang fyri fólkið nakað av tí, sum hann hevur liggjandi í skuffuni heima. Hann sang ógvuliga væl, og fólk hildu fyri, at Páll Oddur væl kundi gerast vinnarin hetta leygarkvøldið.

Hin frontfigurin í Páll Finnur Páll, Finnur Jensen, hevur ein annan stíl. Hansara løg eru meira popp kend. Tað gekk eisini óføra væl hjá Finni leygarkvøldið. Hann spældi fyrst tveir nýggjar sangir hjá sær sjálvum. Harav var annar teirra ein sangur til George Harryson, sála.

Sum sítt síðsta lag kundi Finnur ikki lata vera við at spæla forelskaður sjónleikari.

Tað eru royndir dómarar frá FUT, sum gera av, hvør skal vinna. Teir nýta fleiri metingarstøði. Eitt nú verður stórur dentur lagdur á originalitet og framførslu.

Onkra broyting

Sum nevnt valdu dómararnir Finn Jensen sum vinnara. Hann var ógvuliga væl nøgdur við avriki. Men tað er langt frá vist, at skráin verður tann sama í finaluni.

- Eg arbeiði allatíðina við sangum, og eg rokni við, at skráin verður øðrvísi í finaluni, sigur Finnur Jensen.

Útvarp Føroya tekur upp frá kappingini, og í vikuni ber til at hoyra tónleikin, sum varð spældur í Hafnia Lounge leygarkvøldið.

Mótasýning í SMS

Torgið í SMS verður karmur um stóra mótaframsýning hósdagin

Hósdagin 30. oktober kl. 19.30 verður Torgið í SMS karmur um spennandi mótasýning

MÓTASÝNING
tíðindaskriv

Luttakandi handlarnir til ársins mótasýning á Torginum í SMS hóskvøldið 30. oktober bjóða 210 ókeypis sitipláss til sýningina. Atgongumerkini fáast við at avheinta tey í handlunum, sum luttaka.

Luttakandi handlarnir eru Klivin, Vero Moda, Deres, Flykran, Sportmaster, Skálkur, Skilling, Demmus, Benetton og Bindibúðin. Umframt hesi 210 sitiplássini er sjálvandi hópur av standiplássum.

Koreografur og showmaster hetta kvøldið er Barbara í Gongini, sum lovar eina spennandi heystmótasýning. Hóast torført er at seta eina felagsyvirskrift á mótan og stílin, so sigur hon, at á kvinnusíðuni er retro-80 móti serliga nógv frammi, meðan mannfólkini meira nýta jørðlitir og kanska hip-hop. Annars brúka vaksnu kvinnurnar nógv etnisk klæði, rættiliga væl blandað saman, t.d. við svensku strípum og portugálskum broderíum. Karmarnir til sýningina verða ljósir og positivir, tónleikur, smyrsl og hárseting má alt upplivast í heildini. Sýningin verður sum sagt hóskvøldið 30. oktober kl. 19.30, og tey, ið vilja tryggja sær sitipláss, eiga at skunda sær inn í einum av luttakandi handlunum eftir ókeypis atgongumerkjum.